TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR

Kongabrúgvin
Postboks 329
FO-110 Tórshavn

Tel +298 345600
Fax +298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo

Vinnumálaráðið
Tinganes
Postsmoga 377
FO-110 Tórshavn

2005003241/3
-1. FEB. 2007
SPS

Tórshavn, 31. januar 2007

**Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um tryggingarvirksemi**

Tryggingarfelagið Føroyar (TF) fer við hesum skrivi, at gera viðmerkingar til uppskotið til løgtingslóg um tryggingarvirksemi.

**TF staðfestir:**

- at uppskotið til løgtingslóg um tryggingarvirksemi fylgir ES- og danskari lóggávu fyri tryggingarvirksemi (sambært upplýsingum frá J.P.Tranberg, ið hevur verið við til at orða lógaruppskotið), tó við undantaki av, at avtala við ES krevst áðrenn allar greinir verða settar í gildi.

- at lógaruppskotið gevur Tryggingareftirlitinum størri heimildir og leggur upp til, at Tryggingareftirlitið skal gera neyvari reglur á fleiri økjum.

- at lógaruppskotið smb. kap. 19 staðfestur, at kostnaðurin av at reka Tryggingareftirlitið verður lutaður millum tryggingarfeløgini, ið eru undir eftirliti. Avgjaldið verður m.a. ásett í mun til bruttotryggingargjaldsinntøkuna, og ikki í mun til ta tíð, ið einstøku tryggingarfeløgini nýta hjá Tryggingareftirlitinum.

- at lógaruppskotið leggur upp til fleiri broytingar í mun til verandi lóggávu, ið fáa stóra ávirkan á virksemið hjá føroysku tryggingarfeløgunum, men:
  -at ongin kunnandi evnisfundur hevur verið um lógaruppskotið,
  -at hoyringsfreistin hevur verið stutt (sæð í mun til umfatandi lógaruppskotið),
  -at tað í lógaruppskotinum onki greitt yvirlit er yvir, hvørjar ítøkiligu broytingar eru í mun til verandi lóggávu, og hvat hesar broytingar – hvør í sínum lagi - koma at merkja fyri tryggingarvirksemið og fyri tryggingarfeløgini í Føroyum.



Skráset. nr. 3691

H1

**TF mælir til:**

- **at føroyska lógin um tryggingarvirksemi støðugt verður dagførd soleiðis, at hendan framhaldandi er í tráð við ES-lóggávu.**

  Víst kann í hesum sambandi verða á, at lógaruppskotið er umsett úr danskari útgávu frá 2005, at broytingar frá 2006 eru tiknar við í hesu útgávuni av lógaruppskotinum, men at broytingar, ið verða framdar í donsku lógini í 2007 ikki eru við í føroyska uppskotinum. Tí verður mælt til, at dagføringar, ið verða gjørdar í donsku lógini frá tí, at føroyska lógaruppskotið varð orðað og til lógin verður sett í gildi, koma við í føroyska lógaruppskotið undir nevndarviðgerðini á Løgtingi.
  Nýggja lógin inniber "heimlandseftirlit" fyri fyritøkur úr ES-londum og londum, ið ES hevur gjørt avtalu við. Tvs. at føroysk tryggingarfeløg, ið hava tryggingarvirksemi uttanlanda eru fevnd av eftirliti í Føroyum og føroysku lóggávuni, meðan útlendsk feløg, ið hava tryggingarvirksemi í Føroyum, eru fevnd av eftirliti og lóggávu í teirra heimlandi. Tað er tí av alstórum týdningi, at føroyska lógin um tryggingarvirksemi støðugt verður dagførd komandi árini, soleiðis at hon altíð er í samsvar við ES-lóggávu á tryggingarøkinum.

- **at avtala verður gjørd við ES um tryggingarvirksemi sum skjótast, soleiðis at føroyski tryggingarheimurin verður partur av tryggingarøkinum hjá ES.**

  Hetta fyri at fáa føroysku lógina í samsvar við ES-lóggávu sum skjótast, og fyri at fyribyrgja, at óvissa valdar um karmarnir hjá føroysku tryggingarvinnuni.

- **at tryggja at føroyskar tryggingarfyritøkur virka undir somu fyritreytum sum útlendskar tryggingarfyritøkur.**

  TF gleðist um, at føroyska tryggingarlóggávan nú verður í samsvar við ES-lóggávu, men ynskir samstundis at virka undir somu kørmum sum tryggingarfeløgini í londunum kring Føroyar.
  Tað skal í hesum sambandi verða gjørt vart við, at skattalóggávan í flestu londum rundanum Føroyar er soleiðis sett saman, at borgarar, ið spara upp eftirløn, og tekna óarbeiðsføristryggingar í samband við eina eftirlønarskipan, kunnu draga upphæddina, ið tey rinda til óarbeiðsføristrygging og eftirløn (upp til ávísa upphædd) frá í skattskyldugu inntøkuni. Hetta er tó treytað av, at talan er um eftirlønaruppsparing og óarbeiðsføristrygging, ið verða stovnað í heimlandinum. Sí t.d. § 4 í donsku Bekendtgørelse af lov om beskatningen af pensionsordninger m.v. og § 30 í donsku Lov om finansiel virksomhed.
  Í Føroyum er støðan sambært § 1 E, stk. 2, í Løgtingslóg nr. 51 frá 29 desember 1971 um skatt av rentutryggingum v.m., við seinni broytingum, fylgjandi: *"Inngjøld til eina skipan sambært §§ 1, 1 A og 1 D kunnu av eigaranum við fullari skattskyldu verða drigin frá í tí skattskyldugu inntøkuni, tó ikki arbeiðsmarknaðargjøld."*



Skraset. nr. 3691

H2

Munurin millum Føroyar og fleiri onnur lond er, at skattafrádrátturin í Føroyum verður latin uttan mun til, um eftirlønar- og óarbeiðsføristryggingar verða stovnaðar hjá feløgum í ella uttanfyri Føroyar.
Hetta ger, at karmarnir, ið føroysk lívstryggingarfeløg v.m. hava at arbeiða innanfyri, eru verri enn teir karmar, ið feløgini í ávísum øðrum londum hava at arbeiða innan.

- **at kunnað verður um, nær tær reglur, ið Tryggingareftirlitið skal gera sambært lógini, verða gjørdar, og at hesar verða gjørdar í samskifti við tryggingarvinnuna í Føroyum.** Hetta av tí, at reglurnar kunnu fáa týdning fyri og ávirkan á innanhýsis mannagongdir í feløgunum, og fyri samskiftið við tryggingartakarar og við Tryggingareftirlitið.

- **at kostnaðurin av at reka Tryggingareftirlitið verður lutaður millum tryggingarfeløgini í mun til tað tíð, ið einstøku tryggingarfeløgini nýta hjá Tryggingareftirlitinum, heldur enn at hesin kostnaður verður ásettur í mun til bruttotryggingargjaldsinntøkuna.**

Verður verandi áseting í lógaruppskotinum samtykt, verður tað soleiðis, at tað verður største felagið, heldur enn tað felag, ið krevur mest av arbeiðstíð og –orku frá Tryggingareftirlitinum, ið rindar mest fyri raksturin av Tryggingareftirlitinum. Samanumtikið hevði besta ásetingin verið, um gjaldið til Tryggingareftirlitið varð ásett í mun til tað arbeiði, ið Tryggingareftirlitið hevur av einstaka tryggingarfelagnum – tvs. gjald pr. tíma, ið Tryggingareftirlitið nýtir til eftirlit av tryggingarfelagnum. Næstbesta loysnin var, um gjaldið varð ásett lutfalsliga til ta tíð, ið Tryggingareftirlitið nýtir til einstaka tryggingarfelagið. Meðan versta loysnin er tann, ið uppskotið leggur upp til, har onki samband er millum nýtslu av arbeiðstíð og –orku, og gjald fyri hesa tænastu.

- **at reglur um talgilt samskifti, harundir talgilt undirskriftarmerki, verða settar í gildi skjótast tilber** og í samstarvi við vinnuna v.m., sambært tí heimild, ið Landsstýrismaðurin fær í § 6.

- **at tryggjað verður, at tað í viðmerkingunum í lógaruppskotinum verður gjørt greitt hvørjar ásetingar eru nýggjar í mun til verandi lóggávu, og hvat hesar broytingar merkja fyri tryggingarvirksemið og tryggingarfyritøkurnar í Føroyum.**

- **at Vinnumálaráðið og Tryggingareftirlitið taka stig til, at skipa fyri evnisfundi,** har áhugaði fáa kunning um, hvørja ítøkiliga ávirkan lógaruppskotið fær á tryggingarvirksemið í Føroyum – eitt nú við atliti til upplýsingartreytir, roknskapartreytir, gjaldføristreytir o.s.fr.



Skráset. nr. 3691

H2

## Smærri viðmerkingar

- Í § 7, stk. 3, er fylgjandi ásett: *"Fyritøkur, sum hava fingið loyvi sum tryggingarfeløg, hava einkarrætt til at nýta heiti "tryggingarfelag", "sínámillum felag" ella "eftirlønargrunnur" í navni teirra. Aðrar fyritøkur kunnu ikki nýta nøvn ella heiti fyri teirra virksemi, sum kunnu elva til ta fatan, at tey eru tryggingarfeløg ella eftirlønargrunnar."*
  Mælt verður til, at seta inn "pensjónsgrunnur" afturat, av tí, at bæði heitini "pensjón" og "eftirløn" verða nýtt og merkja tað sama í Føroyum.

- Í viðmerkingunum til § 215 verða "fíggjarfeløg" nevnd fleiri ferðir. Her eigur ivaleyst at standa "tryggingarfeløg" í staðin.

- Í fylgiskjali 1 – Tryggingarvirksemi – Skaðatryggingarflokkar - punkt 7. Farmaflutningur: Fyri at setningurin skal geva meining, skulu orðini "mun til" setast inn millum "uttan" og "slag". Í donsku lógini um fíggjarligt virksemi stendur "alle skader på transporterede varer eller bagage uanset arten af transportmidlet".

- Í fylgiskjali 1 skal verða víst á, at av tí, at ein tryggingarflokkur (nr. 4 - frá yvirlitinum í donsku "Lov om finansiel virksomhed") er komin afturat, skal nummartilvísingin í eftirfylgjandi flokkunum broytast.

- Hartil hevði verið ynskiligt at fingið greiðu á, hvønn skaðatryggingarflokk off-shore vinna og –útgerð kemur undir.

Um tit hava ivamál ella ynskja nærri kunning eru tit altíð vælkomin at venda tykkum til okkara.

Blíðar heilsanir

**Tryggingarfelagið FØROYAR**

Gunnar í Liða
stjóri

Edvard Heen
varastjóri



Skráset. nr. 3691

H2